# Javnt í Hvalba

## 2. deild: Fuglfirðingar lótu annað stigið verða eftir, tá teir um vikuskiftið royndu seg á grasinum

*Jákup Mørk*

Royn-ÍF 2-2 (1-1)

Fyrstu umførini av hesum kappingarárinum vildi so at siga einki rigga hjá hvalbingum, sum noyddust at síggja hini liðini strúka avstað, meðan teir sjálvir lógu sørir í botninum.

**Royn toyggir seg fram**
Seinastu umførini hava tó givið aðrar ábendingar, og so við og hava hvalbingar savnað sær alt meira stig saman.

Leygardagin komu fuglfirðingar so á vitjan, og hóast talan her er um eitt av liðunum, sum frammanundan verður mett millum tey sterkastu í deildini, so so tóktist teir á heimaliðinum als ikki at vera imponeraðir av hesum.

Hvalbingar løgdu seg nevnliga tvær ferðir á odda, men báðu ferðirnar eydnaðist tað kortini mótstøðumonnunum at javna sutta løtu eftir leiðslumálið.

Miðskeiðis í fyrra hálvleiki legði Allan Michelsen heimaliðið fram um, eftir at hann varð spældir leysur framman fyri málið. Fuglfirðingar bíðaðu tó ikki leingi, tí bert einar tveir minuttir seinni, hevði Rúni Justinussen høvdið á einum frísparksinnleggi, og so var javnleikur.

**Óskipað spæl**
Søgan endurtók seg í seinna hálvleiki.

Fyrst var Birgir Jørgensen fyrstur á einum frísparksinnleggi, men løtu seinni var Jákup Baldvinsson spældur leysur, so javnvág aftur var í roknskapinum.

Sum skilst, so var talan sum so ikki um nakran væl spældan fótbóltsdyst, og serliga varð hildið, at nógvar tilvildarliga støður ímomu, tí menn ikki vóru vanir at spæla á grasinum.

Yvirhøvur mundi javnleikur tó vera á eini leið, hóast hvalbingarnir helst iðra seg um, at tað tvær ferðir eydnaðist teimum at blaka leiðsluna burtur.

**Royn-ÍF 2-2 (1-1)**
1-0: Allan Michelsen
1-1: Alvi Justinussen
2-1: Birgir Jørgensen
2-2: Jákup Baldvinsson

# KÍ framvegis niðast

## 2. deild: KÍ er framvegis niðasta liðið í deildini, men tølini siga ikki alla søguna

*Jákup Mørk*

LÍF-KÍ 0-3 (0-0)

Tølini tala onkuntíð týðuligari enn gott er, og hetta hildu klaksvíkingar eisini um útidystin móti LÍF leygardagin.

Í stórum pørtum av dystinum var KÍ nevnliga væl við, og m.a. áttu teir tveir risastórar møguleikar í fyrra hálvleiki, uttan at hetta tó gava nakað mál av sær.

**Avgjørdu í seinna**
Heimaliðið setti alt upp á pláss fyrstu løtuna av seinna hálvleiki.

Fyrsta málið kom, tá Petur Sjúrðarberg slapp at standa leysur við hornaspark og ótarnaður sendi bóltin í málið.

Stutt eftir økti Erik Lervig, tá hann sera hegnisliga lyfti upp um verjuleikara, áðrenn hann fluktaði bóltin í málið. Eitt sera vakurt mál, sum neyvan verður endurtikið í bræði.

Áðrenn KÍ leikararnir vóru komnir fyri seg, hevði Jonhard Høgnesen avgjørt dystin, tá hann úr høgru langaði bóltin flatt við handara stólpa.

Klaksvíkingar vunnu ongantíð aftur á skelkinum, og seinasta hálva tíman kundu leirvíkingarnir so koyra sigurin heim.

LÍF-KÍ 3-0 (0-0)
1-0: Petur Sjúrðarberg
2-0: Erik Lervig
3-0: Jonhard Høgnesen



**Fyri aðru ferð í ár eydnaðist tað vágbingum at vinna á Toftum. Hesu ferð varð sigurin vunninr á grasinum, sum ikki tóktist geva heimaliðnum nakran serligan fyrimun**

Mynd: J. Jacobsen

# Vágbingar nærkast toppinum

## 1. deild: Greiða yvirvágin seinna partin av fyrra umfarinum var nóg mikið at taka øll stigini við at Svangaskarði

VB er í løtuni millum bestu liðini í føroyskum fótbólti. Tað varð staðfest, tá vágbingar hvítusunnuaftan vóru á grasinum á Svangaskarði, har teir vunnu 2–1. Harvið tóku teir seg fram á triðja plássið.

– Tað sær gott út. Nú hava vit heimavøll tvær ferðir, og so ræður um, at vit ikki gera nakað býtt. Vit eiga at hava møguleika at fáa øll stigini, bæði tá toppliðið úr B36 vitjar, og tá vit á jóansøku skulu spæla móti sumbingum. Men í báðum dystunum kunnu vit kiksa, um vit ikki eru fult og heilt savnaðir um uppgávuna, sigur Bjarni Johansen, sum ikki hevði so nógv at gera í VB málinum á Svangaskarði hvítusunnuaftan, sum hann fleiri aðrar ferðir hevur havt at gera í ár.

Vágbingar fingu bæði málini, tá fyrra umfarið var hálvrunnið, og tað hevði einki forgjørt verið í, um teir hesa løtuna høvdu skorað eini tvey mál afturat.

Spælandi venjarin, Krzysztof Popczynski, var tvær ferðir leysur við Magnusi Poulsen. Aðru ferðina kroysti málverjin álopsmannin at senda dygst skeivu megin stólpan, og hina ferðina bjargaði Magnus Poulsen skotroyndini. Popczynski hevði eisini ein góðan stútara, men hann fór akkurát skeivu megin stólpan.

VB hevur stóra tyngd í álopspartinum, og teir tóktust trívast væl á grasvøllinum. Útlendingarnir allir stóðu sterkir í myndini. Janus Kjærbo var drúgvur á verjukenda miðvallarplássinum, Tórður Holm og Milan Kulic vóru góðir at seta í gongd mitt á miðvøllinum, og Palli Augustinussen í høgru og Jón Pauli Olsen í vinstru vóru álopshugaðir vongverjar, sum vóru væl við í spælinum.

Bæði VB málini vórðu skorað eftir hornaspark. Hitt fyrra fekk Robert Cieslewicz, eftir at Milan Kulic hevði sent til handara stólpa, haðani Jón Pauli Olsen stútaði innfyri aftur, og hitt seinna fekk Palli Augustinussen, eftir at eitt sindur av aftur og fram var staðist av, tá toftamenn ikki megnaðu at rudda burtur.

Í 2. hálvleiki fekk Robert Cieslewicz ein veldugan møguleika at økja um leiðsluna. B68 málverjin kiksaði, tá hann skuldi sparka fram á vøllin. Bólturin fór eftir jørðini til pólverska álopsmannin, men hann tóktist so ovfarin at óvæntaða møguleikanum, at hann smekkaði bóltin omanfyri málið, ístaðin fyri at rulla hann í tóma málið.

**Megnaðu ikki at opna**
Heimaliðið legði bragdliga fyri, og tá teir skjótt fingu úrtøku burturúr, kundi tað tykjast sum um teir fóru at hava tamarhald á. Men soleiðis tørnaði tað als ikki út.

Málinum bilti einki. Jákup Eli Olsen sneiddi ein av í vinstru, áðrenn hann smekkaði innfyri. Súni Fríði Johannesen tamdi tætt undir málinum, fekk bóltin um strikuna og megnaði harvið at varðveita í miðal eitt mál í hvørjum landskappingardysti.

Men B68 fekk einki burturúr. Málið hjá teimum setti eld í VB, og sjálvt um heimaliðið í 2. hálvleiki hevði bóltin nógv meiri enn mótstøðumenninir, so megnaðu teir so at siga ikki at spæla seg til upplagdar málmøguleikar. Súni Fríði Johannesen hevði eina lumpisliga skotroynd, sum Bjarni Johansen tók sær av. Annars var talan um spæl fram móti brotsteiginum og onkuntíð høgar bóltar í brotsteigin.

Heimaliðið tóktist ikki at hava tað eyka yvirskotið og tann viljan, sum skal til á grasinum fyri at skapa spentar støður frammanfyri málinum. Verjuspælararnir vóru dugligir at fara framvið, men søgan var tann sama, og harvið tapti B68 fyri aðru ferð á heimavølli í ár. Tað er dýrt, tá tú droymir um at vera við í stríðnum um pláss í Europa Cup!

*jh*

**B68:**
Magnus Poulsen – Jan Petersen, Jan C. Dam, Arnbjørn Danielsen, Jákup Djurhuus, Jákup Eli Olsen – Marlon Jorge, Eyðstein Skipanes, Øssur Hansen – Marcello Marcellino, Súni Fríði Johannesen

**VB:**
Bjarni Johansen – Palli Augustinussen, Predrag Zivkovic, Eyðun Jacobsen, Magni Jacobsen, Jón Pauli Olsen – Tórður Holm, Janus Kjærbo, Milan Kulic – Robert Cieslewicz, Krzysztof Popczynski



# NSÍ skoraði seks mál í hálvan tíma

## Dánial Hansen, sum ikki hevur spælt í NSÍ álopinum síðani í dreingjaárunum, gjørdist stóri maðurin, tá hann skoraði fýra mál, meðan sumbingar hugdu at



**Sumba vardi borg í trý korter, men í seinna hálvleiki skrædnaði fullokomuliga**

Kanska var mettan ov stór hjá sumbingum. Í hvussu so er, sást tað týðuligt, at svongdin hjá NSÍ eftir at fáa stig og vinna var øgilig, tá teir hvítusunnuaftan vóru suðuri á Krossinum í Sumba.

Gestirnir høvdu bóltin nógv største partin av tíðini. Málið tóktist vera, at brúka breiddina á vøllinum og at spæla skjótt fyri at sleppa undan nærdystunum, og tað eydnaðist væl. Sumbingar lógu ov langt frá monnunum, og teir vóru langt í frá so ágangandi, sum teir ofta hava verið. Men hóast NSÍ hevði eina røð av møguleikum í fyrra umfarinum, so eydnaðist teimum ikki at fáa mál. Teir raktu í stólpan, og teir komu inn um Eigil Olesen, men teir sendu í skeivu megin í síðunetið.

Í fyrra umfarinum høvdu sumbingar ein hampuliga stóran møguleika, men Tomajek sendi við síðuna av. Í 2. hálvleiki hevði Sumba heilt lítið at siga. Teir sendu onkrar høgar bóltar í brotsteigin, men tað spurdust ongantíð veruligur málmøguleikar burturúr.

**Broytingarnar**
Trygvi Mortensen mundi hava havt sítt at hugsa um í vikuni upp undir tað, ið ivaleyst væl kundi havt verið lagnudysturin hjá honum sum venjara. Eftir at hava tapt fýra ferðir upp í slag, var kravið trý stig, og sjálvt um tað ikki eydnaðist at fáa hol á undan steðginum, so var sigurin rudduligur.

Tá B36 vitjaði í Runavík, var verjumaðurin Kári Hansen á miðvøllinum. Tað riggaði einki serligt. Í Sumba var Kári aftur í miðverjuni, har hann og Arnfinn Langgaard hildu púra tætt. Dánial Hansen hevur ikki havt tann undanvindin í miðverjuni og á miðvøllinum, sum góðu fótbóltsevnini áttu at borið við sær.

– Dánial plagdi at spæla í álopinum í yngru deildunum. Vit mettu tað vera eina roynd at seta hann í álopið fyri at vita, um hann framvegis hevði máltevið. Hann er góður við høvdinum, hann hevur góðan bóltførleika, og fótbóltsskilið áttu at havt við sær, at hann og Gert Langgaard kundu fáa gagn av hvørjum øðrum. Tíbetur vísti hetta seg at eydnast væl, tí úrtøkan var stór, sigur Trygvi Mortensen, sum vónar, at tey trý stigini í Sumba fara at økja um áhugan fyri fótbóltinum á stevnuni, sum verður í Runavík um vikuskiftið.

**Dánial og málini**
NSÍ fekk hol á, tá seinna umfarið var eitt lítið korter gamalt, og síðsta hálva tíman skoraðu teir seks ferðir. Teir høvdu møguleikar til uppaftur fleiri mál, men royndirnar vóru kanska ikki altíð so nærlagnar síðstu løtuna. Tá vóru teir á heimaliðnum bara níggja á vøllinum. Miðvallararnir Hallur Dam Joensen og Eirikur Joensen fingu boð um at fara av vøllinum, tá teir sóu gula kortið aðru ferð. Hallur reyk út, tá 70 minuttir vóru farnir, og Eirikur reyk út, tá tað restaðu seks minuttir.

Djóni N. Joensen var komin afturíaftur eftir skaðasteðg í fleiri vikur. Tað styrkti um tyngdina á miðvøllinum, og Djóni skoraði fyrsta málið, tá hann stýrdi hornasparksinnleggi úr høgru frá Eddie Mikkelsen í málið.

Og so skoraði Dánial Hansen hartrikk. Fyrst stútaði hann hornasparksinnlegg úr høgru frá Sjúrða Jacobsen í málið, so skoraði hann eftir uppspæl í vinstru og innlegg frá Gert Langgaard, og so fór hann einsamallur og setti bóltin framvið Eigili Olsen.

Gert Langgard var leystur í brotsteiginum, tá hann økti til 5–0, og tað var ein góður minuttur eftir, tá Dánial staðfesti rimmarsigurin. Tað gjørdi hann, eftir at Ian Højgaard var vorðin leysur í vinstru, hevði drigið inn við baklinjuni og spældi útfrá.

*jh*

Sumba:
Eigil Olesen – Mortan úr Hørg, Spasojé Biberdzic, Marlon Kjærbo, Hans Jákup Thomsen, Bergur Winther – Hallur Dam Joensen, Eirikur Joensen, Nicola Biberdzic, Spasoje Tomajek – René Thomsen

NSÍ:
Rúni Joensen – Brynjolvur Nielsen, Arnfinn Langgaard, Kári Hansen, Sjúrður Jacobsen – Sonni L. Petersen, Djóni N. Joensen, Ian Højgaard, Eddie Mikkelsen – Gert Langgaard, Dánial Hansen

# EB/Streymur aftur fremst

## 2. deild: Hóast teir royna at leggja dent á, at teir í løtuni eru í fer við at byggja eitt nýtt lið upp, so er felagsliðið í eysturoynni millum heitastu boðini til beinleiðis uppflytingarplássið

*Jákup Mørk*

EB/Streymur-B36 4-1 (2-0)

Tá tað fyri sjey árum síðani varð gjørt av, at EB og streymur skuldu leggja saman í eitt felag, gekk ikki long tíð, fyrr enn hetta gav úrslit.

Tað eydnaðist nevnliga beinan vegin hjá nýggja liðnum at flyta upp, men eftir steðgurin í bestu deildin ivar tó stuttur, og í 1995 var felagsliðið aftur at síggja í aðru deild.

**Ringa byrjan**
Síðani tá hava teir verið fastir fúsir í næstbestu deildini, og stríðið hevur snúð seg meira um at bjarga lívinum í deildini, heldur enn at tosa um uppflyting. Alfotast hevur hetta verið orsakað av eini vánaligari byrjan upp á árið, men hetta sær nú út til at vera broytt.

Felagsliðið hevur nevnliga fingið eina góða byrjan upp á árið, og í løtuni er teir á fremsta sessinum, tó at tað bert er málmunurin, sum heldur teir framman fyri TB.

**Eingin ivi**
Leygardagin kom so næstbesta liðið hjá B36 á vitjan, og her var eingin slingur í valsinum hjá heimaliðnum. Talan gjørdist nevnliga um ein tryggan 4-1 sigur, og hóast B36 í løtum var væl við, so mundi sigurin sum so vera í lagi.

Heimaliðið hevði betra spælið meginpartin av fyrra hálvleiki, og teir fingu eisini tvey mál, sum Jón Sigurd Gleðisheygg og Knút Vesturtún stóðu fyri. Tað fyrra eftir innlegg úr vinstru, meðan seinna var úrslit av einum langskoti, sum tók í verjuleikara á vegnum.

B36 hevði kanska yvivág í spæli í løtunum kring hálvleikssteðgin, men hóast teir høvdu nakrar naskar royndir, so fingu teir bert tað eina málið, sum Tórálvur Poulsen syrgdi fyri, tá hann sendi fríspark beinleiðis í málið.

Seinasta partin av dystinum var heimaliðið aftur omaná, og og tá fyrst Brian Jensen og síðani Finnbjørn Zachariassen sendu skot í netmeskarnar, var allur ivi um úrslitið ruddaður av vegnum.

**Enda væl**
Sum áðurnevnt, so hevur byrjanin hjá EB/Streymi verið betri enn vanligt í ár.

Megna teir eisini at hava eina eins góðu seinnu hálvu, sum teir vanliga hava, er einki at taka seg aftur í, at teir eru millum heitastu boðini til beinleiðis uppflytan, men áðrenn tað kemur so langt, standa ellivu strævnir dystir á skránni.

**EB/Sttreymur-B36 4-1 (2-0)**
1-0: Jón Sigurd Gleðisheygg
2-0: Knút Vesturtún
2-1: Tórálvur Poulsen
3-1: Brian Jensen
4-1: Finnbjørn Zachariassen



**Liðið hjá UnaArge var einasta føroyska útisetaliðið,sum vann ein sigur um vikuskiftið**

# Mest javnleikir

## Føroyingarnir, sum um vikuskiftið vóru í dysti uttanlands, spældu fyri tað mesta javnt

*Jákup Mørk*

Á Hásteinsvøllinum í Vestmannaoggjunum var føroyingauppgerð, tá Leiftur kom á vitjan hjá ÍBV.

Talan gjørdist um ein málleysan javnleik, og einki er at taka seg aftur í, at teir av Ólafsfirði munnu vera best nøgdir við hetta úrslitið, sum tryggjaði teimum triðja stigið á árinum.

Møguliga vísti úrslitið, at vend nú er um at koma í hjá Leiftri, sum hevur fingið eina stak vánaliga byrjan upp á árið. Í øllum førum hevði stigið við sær, at teir lyftu seg av niðurflytingarsessinum í bestu íslendsku deildini, har teir nú eru nr. 8 av 10 liðum,

**Pál liggur best fyri**
Hitt føroyska liðið, ÍA, við Una Arge, sum tó ikki fær spælt í løtuni, megnaði at vinna tepran 1-0 á Stjarnuni, sum við einum stigi er niðasta liðið í deildini.

Sigurin viðførdi, at ÍA nú er um at fáa rættuliga samband við oddaliðini í deildini, og eru tað í løtuni bert tý stig upp til KR, sum er einsamalt á fyrsta plássinum, tó at fleiri lið eru beint aftanfyri.

Menninir hjá Páll Guðlaugssyni í Keflavík teljast eisini millum liðini í oddinum.

Teir leiktu málleysan javnleik móti Fram, sum er á 7. plássi, og hetta hevði við sær, at Keflavík datt eitt pláss niður á stigatalvni, har teir nú eru á 4. plássinum.

Vann Keflavík dystin, høvdu teir vunnið seg upp á liðina av KR, men so varð kortini ikki hesa ferð.

**Hans Fróði framvegis úti**
Í næstbestu norsku deildini máttu Julian Johnsson og Kurt Mørkøre enn einaferð klára seg uttan hjálp frá Hans Fróða Hansen.

Mánakvøldið leikti Sogndal móti Strømsgodset, sum er annað av liðunum, sum longu hevur sett kós uppeftir, og endaliga úrslitið gjørdist javnleikur, 1-1.

Sogndal legði seg annars á odda tá 28 minuttir vóru leiktir, men Strømsgodset javnaði fýra minuttir seinni. Málið hjá Strømsgodset skeyt navnframi Jostein Flo.

Hóast teir vóru ein mann í yvirtali seinasta hálva tíman, eydnaðist tað ikki Sogndal at avgera dystin til egnan fyrimun.

Líkt er tó til, at Sogndal eftir eina laka byrjan hevur fingið meira glið á spælið, og í løtuni eru teir á einum sætta plássi, og fjarstøðan upp til uppflytingarsessirnar tykist ikki vera alt ov stór.